Audi Allroad Quattro Concept

# Framkomin konseptbilur frá Audi



*Audi Allroad Quattro Concept hevur so gott sum sama karossarí sum nýggi Audi A6 Avant, men hesin sær munandi meira sportsligur út. Motorurin er ein 4.0 litur V8 TDI við commonrail innspræning, "piezoinjektor" og 286 hk*

**Á bilaframsýningini North American International Automobile Show avdúkar Audi konseptbilin Allroad Quattro Concept. Bilurin er gjørdur í sambandi við at 25 ár eru liðin síðan fyrsti Audi Quattro kom á marknaðin**

BILAR

*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Hugsjónin hjá Audi við Allroad Quattro Concept er, at bilurin skal vera ein heimsnýggjheit við tøkniligum framstigum, ið koma á marknaðin um nøkur ár.

Bilurin hevur so gott sum sama karossarí sum nýggi Audi A6 Avant, men hesin sær munandi meira sportsligur út og er tað eisini.

Allroad Quattro Concept er gjørdur í sambandi við at 25 ár eru liðin síðan fyrsti Audi Quattro kom á marknaðin.

Til dømis hevur bilurin optiskar sensorar, sum registrera í hvørjum standi vegurin er - um tað t.d. er grús ella ísur á vegnum. Hesir upplýsingar verða sendar til elektronisku stabilitetsskipanina (ESP) og til frástøðureguleringina (adaptive cruise control), so hesar skipanir altíð virka optimalt. Fríhæddin kann eisini broytast frá 16-21 cm.

Bilurin er útgjørdur við (Audi lane assist). Ein skipan sum ávarar móti vibratiónum í rattinum, um bilførarin t.d. óviljað koyrir út av vegnum. Ein onnur skipan (Audi side assist) registrerar tá aðrir bilar nærkast, eisini um teir koma frá einum blindum vinkli frá síðuni.

Motorurin er ein 4.0 litur V8 TDI við commonrail innspræning og "piezoinjektor". Talan er um ein tann mest framkomna motorin við 8 sylindarum í heiminum. Við 286 hk og einum snúningsmomenti upp á 650 nm er bilurin kvikur sum ein sportsbilur og koyrir frá 0-100 km/t upp á 6,4 sek. Toppferðin er elektroniskt avmarkað til 250 km/t.



*Allroad Quattro Concept innan. Bilurin hevur nógvar innbygdar og framkomnar skipanir, ið koma á marknaðin um nøkur ár*



*Allroad Quattro Concept við innbygdum spoilarum, sportshjólum og tveimum útstoytum*

## Discovery ársins bilur



Land Rover Discovery 3 TDV6 Automatic er kosin ársins bilur 2005 av stóra bretska bilmagasininum "What Car". Hetta er aðru ferð, at teir hava kosið Land Rover til Ársins bil. Seinast var í 1998, tá Land Rover Freelander, sum tann fyrsti 4x4, fekk hendan heiður

*Kelda: Land Rover Presse & PR*

## Ársins bilur í USA



Ein felags dómsnevnd frá USA og Kanada og bilmagasinið "Motor Trend" hava kosið Chrysler 300C ársins bil í USA. Chrysler 300C er ein best umtóktu bilum í USA og Kanada.

*Kelda: Motor Magasinet*

## Hyundai í USA



Um nakrar vikur taka Hyundai eina nýggja bilverksmiðju í brúk í Alabama í USA, ið m.a. skal framleiða nýggja Hyundai Sonata. Hyundai eru í USA kendir fyri góðan kvalitet

*Kelda: Motor Magasinet*